Sørvágs kommuna

# Kunningarskriv

# 2012









www.sorvag.fo

Sørvágs Kommuna
Varðagøta 8 • FO-380 Sørvágur
tlf. +298 363200 • fax +298 363201 • www.sorvag.fo

# Kunningarskriv 2012

Hetta er fjórða og síðsta kunningarskriv hjá sitandi bygdaráði. Í hesum sambandi fara vit at líta aftur um bak, fyri síðani, sum siður er, at seta út í kortið, hvat ætlanin er at gera í ókomnum tíðum. Gamalt er at siga, at eitthvørt stýri byggir á herðarnar á teimum, sum undan eru farin. Tað stendur tó sjálvandi upp til nývalda bygdaráðið, um tað fylgir teimum raðfestingum, sum sitandi bygdaráð hevur gjørt.

Hugsa vit jaliga, so royna tey flestu at gera tað góða, bæði fyri síni nærmastu, sína bygd og sítt land, men fyritreytirnar kunnu broytast, og eins og veður og vindur gera, at kósin má setast av nýggjum, so er tað eisini soleiðis í politikki, at neyðugt verður at broyta kós, um fyritreytirnar krevja tað.

## 2009

Í 2009 skuldi 07 Vestur spæla í bestu deildini. Bygdaráðið setti sær fyri, at dystirnir skuldu kunna spælast á Dungasandi, og tí máttu 300 setur gerast við vøllin. Tað vóru krøvini frá myndugleikunum.





Hetta árið vóru viðurskiftini við eigararnar um vetrarfriðing endaliga komin upp á pláss. Tað tók drúgva tíð, frá tí at málið varð reist, til tað endaliga varð loyst. Óneyðugt er nú hjá teimum, sum seta búgv, at girða seg inni við seyðahøgum garði ella hegni, og sostatt kunnu runnar og trø plantast, áðrenn húsini eru bygd.

Arbeitt verður dúgliga á Gamla skúla. Innsiglingarljósið, ið hevði verið spæliplàss og klatristativ hjá børnunum, umframt at leiða bátar og skip trygt gjøgnum Mykinesfjørð inn á bryggjuna, varð flutt yvir á vestara áarbakka á Kirkjuánni. Havarnir hjá Olgu og Mariannu vórðu tiknir niður, og gravkýr og lastbilar skotraðust í økinum, so onkur helt, at alt hetta fjasið við einum 100 ára gomlum skúla var eitt prógv um, at tann síðsti býttlingurin var ikki deyður enn. Tá avtornaði mundu tó tey flestu vera takksom fyri, at gravkúgvin ikki gjørdi enda á skúlanum, sum nú er eitt satt prýði fyri bygdina.

**Sørvágs Kommuna**
Varðagøta 8 • FO-380 Sørvágur
tlf. +298 363200 • fax +298 363201 • www.sorvag.fo





**2010**

Svimjihøllin, sum varð tikin í brúk í 1974, hevði ikki fingið nevniverdar ábøtur øll hesi mongu árini. Hóast røktin av skúlabygningunum altíð í nýggjara tíð hevur havt høga raðfesting, so fer tíðarinnar tonn við øllum fyrr ella seinni.Tekjan var vánalig og trongdi til at skiftast út. Í summarfrítíðini varð dúgliga arbeitt hetta árið. Tekjan varð skift, loftini og el-skipanin í ovaru hæddini vórðu eisini endurnýggjað.





Í hesum valskeiðnum hevur eisini nógv verið gjørt fyri at fríðka um í bygdunum. M.a. hevur Bøur fingið sítt miðbygdarøki, eins og Sørvágur hevur fingið Ellusa hava og økið Niðri á Stakka. Í báðum støðum eru jólatrøini í ár komin til heiður og æru.





Í bátahylinum var heimari armurin hampaður, meðan uttari armurin sá út, sum tá hann var gjørdur í 1977. Avtala varð gjørd við Kristian Olsen, arbeiðstakara, um at hampa armin og innsiglingina. Á endanum á arminum, har innsiglingin er, er gamli Múlafýrurin farin at gera nyttu aftur.





**2011**

Í 2011 varð farið undir eina skipaða dagføring av skúlanum. Nýggj tekja varð løgd á gomlu fimleikahøllina og gomlu skúlabygningarnar, samstundis sum lendið oman fyri bygningarnar er drenað, bjálvað og vætutryggjað. Lyftir og rampa eru settar upp, so lættari er hjá fólki at koma runt í bygningunum.





Arbeiði at leggja 5000 metrar av slangu niður í sandin var lokið í november í hesum árinum, og ábendingar vóru um, at skipanin fór at loysa seg. Vit skulu seinni í hesum skrivinum koma aftur til, hvussu stórar sparingarnar hava verið.





Í august mánaði trýsti Jegvan Heinesen úr Bø á knøttin á reinsiverkinum, so nú hava bygdirnar Sørvágur, Mykines og Bøur reinsað vatn.





2. september 2011 var hátíðarhald í SOR-bygninginum, har avtala varð undirskrivað millum Landsverk, Sørvágs kommunu og Krígssavnið um, at Krígssavnið fær SOR-bygningin við tað, at Sørvágs kommuna letur eitt byggibúgvið grundstykki burtur av ídnaðarøkinum Upp á Hálsi til Landsverk.





**Fíggjarætlanin fyri 2012**

Tað er nevnt í onkrum kunningarskrivi, at tað, at vit kunngera fíggjarætlanina við ársbyrjan, og so taka afturíaftur við ársenda, kann vera við til at halda í oyrunum á okkum sjálvum. Hvat varð broytt í árinum, sum fór og hví, eru viðkomandi spurningar hjá borgarunum at fáa svaraðar.

**Ætlanin fyri íløgur í 2012**

Alvalon .................... 250.000
Skúlin ...................... 5.730.000
07 Vestur ................. 2.400.000
Fríðkan .................... 606.000
Vatn ......................... 150.000
Kloakkir ................... 153.000
Vegir ........................ 1.930.000
Sørvágs havn ............ 300.000
**Íløgur íalt ............... 11.519.000**

### Alvalon

Tey síðstu árini eru smærri játtanir givnar til loftið í bygninginum. Nakað er brúkt til tað í árinum, sum fór, og køkur er eisini gjørdur í miðhæddini, so møguleiki er at gera heitan mat í góðkendum høli. Í komandi ári er ætlanin at inniloka tað, sum enn er opið. So skuldi verið liðugt við umbyggingunum, og loftið skuldi verið arbeiðsligari og meira atkomuligt.

### Skúlin

Um skúlan søgdu vit, at ætlanin í 2012 var at gera dur millum svimjihøllina og gomlu fimleikahøllina, so høvuðsinngongdin í næstu framtíð verður flutt. Vindeygu og hurðar verða útskift, eins og útveggirnir á gomlu bygningunum verða bjálvaðir og klæddir við timbri. Ventilatión og el-útbúnaðurin verður eisini endurnýggjaður.

Íløgan í skúlan kom at verða hægri enn ætlað við ársbyrjan. Vit hava roynt at órógva skúlagongdina so lítið, sum til ber, og tí gjørdu vit í summar meir, enn vit ætlaðu við ársbyrjan. Tá tilboð og avtalur vórðu gjørdar saman við teimum avtalum, sum eru gjørdar í byggitíðini, var íløgan í skúlan 7,3 mió. kr.

Á árligu umhvørvisstevnuni vann Sørvágs skúli fyrstu virðisløn, sum "Ársisns grøni stovnur." Sjóvarhitin og bjálvingarátøk eru høvuðsorsøkirnar til virðislønirnar.





### Grundgevingin

Metingarnevndin er samd um, at her er stovnur, ið er komin langt ávegis við nýggjari orkuskipan til upphiting av bygningunum og virksemi á stovninum.

Afturat orkuskipanini verða bygningarnir albøttir soleiðis, at orkutapið verður sum minst, og afturat verður spillhitin frá inniluftini o.ø. endurnýttur.

Orkutøknin hevur verið virkin í gott hálvt ár og vísir seg at rigga eftir ætlan. Orkuskipanin kann nýtast sum fyrimynd fyri stórar bygningar, men eisini fyri bústaðir ella býlingar.

**07 Vestur**

Í síðsta tíðindaskrivi varð sagt, at 07 Vestur ætlaði at byggja felagshús vestan fyri SÌ-húsið. Henda ætlan er nú slept, tí feløgini eru samd um, at grundarlag ikki er fyri at hava tvey fótbóltshús við vøllin, tá 07 Vestur hevur yvirtikið raksturin av øllum fótbóltinum í bygdini.

Samráðingar eru millum SÌ og 07 Vestur um keyp av húsinum. Bera samráðingarnar á mál, er ætlanin hjá felagsliðnum at byggja afturat verandi húsi, so umstøðurnar verða nøktandi til tann tørv og krøv, sum sett verða til fótbóltin framyvir.

**Fríðkan**

Í hesum árinum er vegamótið millum Rossatrøðna og Niðaraveg gjørt, eins og vegamótið millum Ovara- og Niðaraveg er liðugt. Á skúlanum er lendið norðan fyri gomlu fimleikahøllina lagt við harragarðssteinum, og trappur eru laðaðar oman í økið.






**Vatn**

Stórar íløgur eru gjørdar í vatnleiðingar á Húsadalsvegnum. Har eru tvey rør løgd í vegin, sum eru høvuðsleiðingar til flogvøll v.m. og hin til bygdina. Tað, at finna stykkleiðingar, hevur tikið sína tíð, men íbúgvarnir á hesum vegastrekki hava brynjað seg við toli. Hetta arbeiði er nú loksins liðugt.

**Vegir**

Nøkur nýggj vegastrekki eru asfalteraði í ár. Í Billubønum er vegur gjørdur við øllum leiðingum, og í januar mánaði verða 5 grundstykkir matrikuleraði. Eitt er umbiðið, so høvi verður at seta 4 grundøkir til sølu um stutta tíð.

**Sørvágs Kommuna**
Varðagøta 8 • FO-380 Sørvágur
tlf. +298 363200 • fax +298 363201 • www.sorvag.fo

**Samanumtikið**

Skulu vit taka saman um árið 2012, hvat kommunuskattainntøkum viðvíkir, so hevur fyribilsskatturin fyrstu 11 mánaðirnar í 2012 verið 28.735.587 kr. í mun til 29.039.410 kr. fyrstu 11 mánaðirnar í 2011. Hetta er ein minking upp á 303.823 kr., sum í prosentum svarar til 1.05%.

Fyri árið 2012 metti bygdaráðið inntøkurnar at fara at verða:

| | |
|---|---|
| Kommunuskattur | 30.000.000 |
| Felagsskattur | 600.000 |
| Skattur av eftirløn | 500.000 |
| **Inntøkur íalt** | **31.100.000** |

Fyribilstølini fyri 2012 síggja soleiðis út:

| | |
|---|---|
| Kommunuskattur | 28.735.587 |
| Felagsskattur | 2.797.648 |
| Skattur av eftirløn | 604.222 |
| **Inntøkur íalt** | **32.137.457** |

Hyggja vit eftir tølunum, so er felagsskatturin nógv hægri, enn vit høvdu mett. Við skatti av feløgum er tað soleiðis, at vit fáa lut í skattinum av feløgum, sum eru skrásett í okkara kommunu, men vit fáa eisini í mun til fólkatalið av øðrum feløgum so sum peningastovnum, tryggingarfeløgum, oljufeløgum v.m. Tað sama ger seg galdandi, tá talan er um skatt av eftirlønum. Í hesum valskeiðnum hevur felagsskatturin verið niðri á 400.000 kr., meðan hann í ár er 2.797.648 kr.

Rokna vit kommunuskattin upp til 12 mánaðir, og tað plagar at vera á einari leið, so verður samlaða kommunuskattainntøkan 31.347.913 kr. fyri árið. Tað vil siga, at fyribilstølini síggja soleiðis út:

| | |
|---|---|
| Kommunuskattur | 31.347.913 |
| Felagsskattur | 2.797.648 |
| Skattur av eftirløn | 604.222 |
| **Inntøkur íalt** | **34.749.783** |

Munurin millum fyribils inntøkutølini og metingarnar við ársbyrjan eru sostatt:
**(34.749.783 – 31.100.000) = 3.649.783 kr. í meirinntøku.**

Tann stóra upphæddin í hesari stuttu lýsingini av inntøkunum er kommunuskatturin. Tey tølini, vit kunngera her, eru fyribilstøl. Tey endaligu tølini fyri árið koma ikki fyrr enn í oktober mánaði árið eftir, men fyribilstølini hava verið á einari leið tey síðstu árini.

Sum lesarin sær, so hava vit verið í so varnir við inntøkumetingunum eisini í 2012, men tað er ongantíð ein trupulleiki, at inntøkan er størri enn mett, heldur tvørturímóti. Tað kemur okkum øllum til góðar í síðsta enda.

**Fíggjarætlanin 2013**

Fyri at fíggja rakstur og íløgur hevur kommunan eina fíggjarætlan, sum verður samtykt fyri fyrsta desember á hvørjum ári. Okkara varð endaliga einmælt samtykt við 3. viðgerð 28. november 2012.

**Høvuðstølini í fíggjarætlanini eru:**

| | |
|---|---|
| Rakstrarútreiðslur | 28.034.000 kr. |
| Avdráttur | 1.037.000 kr. |
| Íløgur | 14.830.000 kr. |
| | |
| Samlaðar inntøkur | 33.401.000 kr. |
| | |
| Fíggjarætlanin javnvigar við | 43.901.000 kr. |
| Rakstrarútreiðslur + íløgur | 43.901.000 kr. |
| Inntøkur + lán | 43.901.000 kr. |

Fyri at fíggja ætlaðu útreiðslurnar er neyðugt at lána 10.5 mió.kr. Barnafrádrátturin verður óbroyttur 4000 kr. fyri hvørt barnið, og skattaprosentið verður óbroytt 21,0 % fyri skattaárið 2013. Sum nevnt verður seinni, so fer dagføringin og umbyggingin av skúlanum við so stórum upphæddum, sum ikki rúmast innan fyri okkara fíggjarkarmar, og tí hava vit valt at taka lán, sum kann tykjast í størra lagi.

**Eldraøkið**

Okkara skattaprosent liggur framhaldandi undir tí, sum flestu miðalstóru kommunur hava, og væl lægri enn tað, sum okkara nærmastu grannar hava. Hækkaðu vit skattaprosentið upp í 23%, so høvdu inntøkurnar hækkað við umleið 3 mió. kr. Sitandi bygdaráð hevur hildið tað vera rætt at royna at húsast við tí skattaprosenti, vit hava, og so heldur hava møguleika at hækka tað, um okkurt heilt serligt skuldi hent.

Sum dømi kann nevnast, at sitandi samgonga ætlar at leggja eldraøkið út til kommunurnar. Um nóg nógvur peningur fer at fylgja við, kunnu vit ivast í, um hugt verður eftir, hvussu tað almenna hevur røkt okkara 40 ára gamla ellisheim. Vit mugu seta okkum sum mál, at tey gomlu hava mannsømilig og virðiligar umstøður, eins og vit hava gjørt við tað yngra ættarliðið. Tá barnaansingin varð løgd út til kommunurnar, so kostaði tað kommununum pening, eins og barnaverndarøkið hevur kostað okkum pening. Um útleggingin verður gjørd eins og barnaverndin og barnaansingin, so fer økið at kosta og tað nógv. Í ringasta føri kann tað tá gerast neyðugt at hækka skattaprosentið.

**Fíggjarstøðan**

Í tíðindaskrivinum í fjør metti undirritaði, at skuldin hjá kommununi fór at verða 13,7 mió.kr. við árslok í fjør, meðan skuldin við árslok í ár fór at verða 21 mió.kr. Tey røttu tølini eru 13 mió.kr. og 20 mió.kr., so tann metingin var á einari heilt góðari leið.

Vit í Sørvágs kommunu hava roknað nettoskuldina soleiðis tey síðstu nógvu árini, at hon er langfreistað lán, har innistandandi peningur verður frádrigin.

Fíggjarmálaráðið, sum er okkara evsti myndugleiki, ger nettoskuldina øðrvísi upp. Teir gera hana upp sum langfreistaða og stuttfreistaða skuld, har frádrigið verður onnur áogn og tøkur peningur. Hetta gevur heilt onnur tøl, sum vit fara at nýta í framtíðini fyri at kunna samanbera okkum við aðrar kommunur.

Við árslok í 2011 var nettoskuldin eftir nýggja háttinum 7,6 mió.kr. Eftir fíggjarætlanini skuldi hon verið 15 mió.kr við árslok í ár, men tað verður hon neyvan. Inntøkurnar eru størri, og eisini hevur bygdaráðið samtykt íløgur, ið ikki vóru við í ætlanini, m.a. er samtykt at keypa bankabygningin hjá BankNordik. Tá roknskapurin fyriliggur einaferð í vár, verður hann kunngjørdur á heimasíðuni hjá kommununi.

**Íløguætlan fyri 2013**

| | |
|---|---|
| Kommunufyrisiting | 100.000 |
| Alvalon | 100.000 |
| Skúlin | 10.900.000 |
| Ítróttaranlegg | 700.000 |
| Fríðkan | 664.000 |
| Byggibúning | 100.000 |
| Vatnveiting | 108.000 |
| Kloakkir | 542.000 |
| Nýggir vegir | 1.074.000 |
| Gøtuljós | 217.000 |
| Havnir og lendingar | 325.000 |
| | |
| **Íløgur íalt** | **14.830.000** |

**Skúlin**

Aftur í ár fer skúlin við tí størsta partinum av íløgunum. Í sambandi við hátíðarhaldið, sum var tá ið umvælingararbeiðið í 2012 var lokið, vóru myndir vístar, har greitt eisini var frá, hvussu ætlanin var at dagføra og umbyggja skúlan. Tekningarnar eru til ummælis hjá skúlastýri og námsfrøðiliga ráðnum, og verða ikki tær stóru broytingarnar gjørdar í verkætlanini, so er ætlanin at arbeiðið skal byrja komandi vár.

Viðvíkjandi sjóvarhitanum, so er so mikið fráliðið nú, at vit kunnu gera nakrar samanberingar um nýtsluna í mun til, tá skúlin ikki var bjálvaður, og tá oljufýringarnar góvu hitaorkuna.

Í november 2011 spardi skúlin 26000 kr. í mun til november 2010. Í 2011 var skúlin ikki bjálvaður. Í ár, nú skúlin er bjálvaður, spardu vit 32000 kr. í mun til 2010, so hetta er ein sterk ábending um, at sjóvarhitin og bjálvingin hava virkað eftir ætlan, og at sparingin fer at verða um tær 300.000 kr. árliga, sum umboð fyri Jarðfeingið upplýsti í samband við, at skúlin var vístur fram fyrr í heyst.





**Nýggir vegir**

Í sambandi við tær útstykkingar, ið gjørdar eru síðstu árini, eru vegastrekki í øllum bygdunum, sum ikki eru liðug. Vit plaga at bíða við asfaltsarbeiðinum og gongubreytum, til útgrevsturin í økinum er liðugur. Nýggja bygdaráðið fer, saman við tekninsku nevnd, at gera av, hvar og hvussu peningurin verður brúktur í komandi ári.

**Kloakkir**

Tann 30.12.2011 sendi kommunan spillivatnsætlanina til Umhvørvisstovuna til góðkenningar, men haðani er einki svar komið enn. Tað sýnist, sum um ætlanin verður jólatrøll, men fyrr ella seinni mugu vit fáa eitt svar, tí sami myndugleiki, sum sigur, at kloakkskipanin skal vera liðug í 2015, kann ikki bøla oman á ætlanini í áravís, tí givið er, at tann tíð, sum vit bíða eftir Umhvørvisstovuni, verður í síðsta enda løgd afturat evsta marki í 2015.

**Almennir pengar**

Av landsins fíggjarlóg eru nakrar krónur komnar til høldar í skjótt farna ári av tí konto, ið kallast stuðul til infrakervið á útoyggj. Niðri í gjónni í Mykinesi er arbeitt við at tøma hylin fyri grót, sum hevur verið til ampa, og nakað er asfalterað í Fjørdalsgøtu. Eisini fekk almenna WC í bygdini eina upphædd. Í komandi ári hava vit søkt um stuðul til at skifta spælið út, ið dregur vognin við neyðsynjarvørum og viðføri frá lendingini niðan um Sagulaðið.





Í Sørvági er Landsverk byrjað at breiðka Traðarbrekku, sum er landsvegur, og vónandi verður avsetta upphæddin til ábøtur á landsvegir av slíkari støðd, at arbeiðið kann halda fram í komandi ári.





**Vinnulívið**

Tá talan er um kommunalan- ella almennan búskap, so er tað í síðsta enda vinnulívið, sum skapar peningin, ið fer í umfar í samfelagnum til tænastur ella íløgur, ið skulu menna okkum sum fólk og lætta um gerandisdagin hjá tí einstaka borgaranum. Nøkur øki í landinum hava nógv alment virksemi, meðan onnur hava lítið og einki. Vanligt er, at miðstaðarøkið verður gøtt og føtt av almennum peningi, meðan lítið og einki fellur til útjaðaran. Tey øki, sum hava nógv vinnulív av sama slag eru viðbrekin, tá illa gongst í tí vinnugrein, sum er yvirumboðaði í teirra øki. Hetta sást skilliga, tá Fiskavirking fór av knóranum.Tey øki í landinum, har fiskavirking og botnfiskaveiða undir Føroyum vóru høvuðsálitið, høvdu stóra búskaparliga afturgongd.

Tað merktist ikki í okkara kommunu, at Fiskavirking fór av knóranum, tí fiskavirking av týdningi hevði ikki verið her í fleiri ár, og nøgdirnar, ið Landingarmiðstøðin tók ímóti høvdu verið vaksandi ár um ár, og var størst í 2010, tá 9000 tons fóru um bryggjukantin. Landingarmiðstøðin hevur víðkað sítt virksemi, soleiðis, at tikið verður móti fiski eisini á vestaru bryggju í Havn. Av tí at fiskaríið vestan fyri Føroyar vegna friðingar m.a. hevur verið lítið og einki, eins og upsafiskaríið aftur hevur svikið í ár, so er nøgdin av fiski tann minsta, sum er farin um bryggjukantin í fleiri ár, nevniliga 3000 tons av botnfiski undan Føroyum.

Havast skal eisini í huga, at trolararnir Vesturleiki og Brestir hava lagt um, soleiðis, at veiðan verður fryst umborð.

Báðir trolararnir gjørdu eina roynd eftir makreli í fjør. Tá varð veiðan avreidd til móðurskipið Lafayette, sum virkaði fiskin umborð. Í ár eru báðir trolararnir umbygdir til frystitrolarar. Um gongdina sigur reiðarin, Tummas Henriksen, at tekniskt kundu skipini havt riggað betur, men teir vóna at koma barnasjúkunum til lívs í nærmastu framtíð.



**Hiddenfjord**

Tey síðstu árini er alivinnan vorðin ein kappingarneyti til fiskiskap á bæði nær- og fjarleiðum. Fyri okkara viðkomandi er nøgdin, sum verður slaktað á Hiddenfjord virkinum á bryggjuni av Gøtuvík, Miðvági og okkara egna firði, vaksandi. Í 2010 vóru 5000 tons tikin, í 2011 vórðu tonsini 7700 og í ár verða væntandi 7400 tons tikin. Gongur sum ætlað, verða 12000 tons tikin í komandi ári.

Hin 10. oktober í ár var allur laksurin á fjørðinum tikin, og 10. desember var smolt sett út av nýggjum. Longu í desember næsta ár er ætlanin at taka fyrstu fiskarnar til kryvjingar, og grundin til, at fiskurin gongur so stutta tíð í sjónum, er, at fyrr vigaði smoltið 70 gramm, sum varð útsett, meðan tað í dag vigar 300-400 gramm, og tí verður tíðin í sjónum nógv styttri.





**Sørvágs Kommuna**
Varðagøta 8 • FO-380 Sørvágur
tlf. +298 363200 • fax +298 363201 • www.sorvag.fo

**Vága floghavn**

Í desember 2011 varð longdi flogvøllurin tikin í nýtslu. Fyri teimum, sum starvast á Vága floghavn, er eingin ivi um, at longda flogbreytin og íløgan í nýggj innflúgvingartól hava gagnað føroyskari flogvinnu og ferðafólkunum sera væl.

Í mars 2012 fekk Atlantic Airways nýggja Airbus 319 flogfarið, sum tekur 144 ferðafólk. Hetta var ikki gjørligt, um flogbreytin ikki var longd. Eisini hava fleiri smærri flogfør sett seg í Vágum í 2012 enn tilsvarandi í 2011.

Í skrivandi løtu er nógv, sum bendir á, at flogvøllurin í Vágum setur met í ferðafólkatali í 2012. Núverandi metið varð sett í 2008, tá ið 221.942 ferðafólk ferðaðust um Vága Floghavn.

Longda breytin eigur sín avgjørda lut í vaksandi talinum av ferðafólkum. Men tað vísir seg, at føroyingar aftur eru farnir at ferðast meira. Fleiri útlendsk ferðafólk hava verið í Føroyum í ár, eins og oljuleitingin og so eitt vaksandi tal av føroyingum, sum arbeiða í Norra, hava havt sína ávirkan.

Samanumtikið er virksemið á flogvøllinum í Vágum í vøkstri, og vónandi veksur tað enn meira í komandi árum, hetta bæði Sørvágs kommunu og Føroya fólki at gagni.





**Ídnaðarøkið á Hálsi**

Tað hevur ikki verið tað stóra virksemið uppi á ídnaðarøkinum, men nú tykist broyting at koma í. Vága Bjargingarfelag byggir høll, sum skal hýsa ymiskum virksemi, meðan Atlantic Airways leigar bygningin hjá Sp/f Berg Rasmussen til lagurbygning. Á Hálsi nr.1 húsast fleiri feløg. Har eru: JimS., EUR-express, H.A Bilar og Atlantic Airways, so í nýggja árinum koma umleið 30 fólk at starvast í og út frá bygninginum, og tað er ikki lítið eftir okkara mátistokki.



**Atlantic Airways**

Føroyska flogfelagið húsast eisini í okkara kommunu. Teirra virksemi avspeglast eisini í inntøkunum hjá kommununum í Vágum.

Samlaða framleiðslan hjá felagnum fall 4 % fyrstu tríggjar ársfjórðingarnar í 2012 í mun til sama tíðarskeiðið í fjør. Færri túrar á Keypmannahavnarrutuni eftir at nýggja Airbus flogfarið kom, er orsøkin til, at tímatalið er fallið. Flogfarið tekur 144 ferðafólk, ið er munandi fleiri enn gomlu flogførini. Rutuflúgving stendur fyri 64 % av framleiðsluni, meðan leiguflúgving stendur fyri 23 % og tyrluflúgving fyri 13 %.

Ferðafólkatalið á rutunetinum er økt 6 % úr 154.044 ferðafólkum upp í 163.032 ferðafólk fyrstu tríggjar ársfjórðingarnar í 2012 í mun til sama tíðarskeiðið í fjør.

Fyrstu tríggjar ársfjórðingarnar í 2012 hevði Atlantic Airways 20 mió.kr. í avlopi fyri skatt í mun til 27 mió.kr. í avlopi sama tíðarskeiðið í fjør.

Komandi ár kemur eitt Airbus flogfar afturat í flotan hjá felagnum. Hetta flogfar verður annaðhvørt keypt ella leigað, og fer at flúgva leiguflúgving úr Danmark til Egyptalands og lutvíst rutuflúgving til Føroya.

**Sørvágs Kommuna**
Varðagøta 8 • FO-380 Sørvágur
tlf. +298 363200 • fax +298 363201 • www.sorvag.fo






**Fundir v.m.**

Bygdaráðið hevur havt 12 bygdaráðsfundir í 2012. Ìalt 158 mál hava verið til viðgerðar.
Bygdaráðið hevur ásett føstu bygdaráðsfundirnar fyri 2013. Fundirnir verða kl. 18$^{00}$ í fundarhølinum á kommunuskrivstovuni niðan fyri nevndu dagar:

| | |
|---|---|
| Mikukvøldið | 23. januar |
| Hóskvøldið | 28. februar |
| Hóskvøldið | 21. mars |
| Mikukvøldið | 24. apríl |
| Mikukvøldið | 29. mai |
| Mikukvøldið | 26. juni |
| Mikukvøldið | 04. september |
| Mikukvøldið | 25. september |
| Mikukvøldið | 30. oktober |
| Mikukvøldið | 06. november |
| Mikukvøldið | 27. november |
| Mikukvøldið | 11. desember |

Mál, sum skulu verða viðgjørd á bygdaráðsfundi, skulu vera kommununi í hendi 14 dagar fyri fundin.
Eykafundir ella broytingar í skránni verða lýstir í svørtu talvu á kommunuskrivstovuni og á heimasíðuni hjá Sørvágs kommunu.

**Sørvágs Kommuna**
Varðagøta 8 • FO-380 Sørvágur
tlf. +298 363200 • fax +298 363201 • www.sorvag.fo

**Bygdaráðsvalið 2012**

Á bygdaráðsvalinum, sum var 13. november 2012, stillaðu 21 fólk upp. Tey 7, ið skulu manna bygdaráðið komandi valskeið, eru vald í hesi raðfylgju við niðan fyri nevndu atkvøðum:

| | |
|---|---|
| Sune Jacobsen | 133 |
| Jákup á Stongum | 43 |
| Jákup Suni Lauritsen | 46 |
| Thordis Skaalum | 43 |
| Jóhan á Ørg | 45 |
| Ragnar í Haraldsstovu | 40 |
| Hendrik T Olsen | 43 |

Nývalda bygdaráðið samtykti einmælt á fundi 14. november 2012 at velja Suna Jacobsen til borgarstjóra. Jóhan F. á Ørg varð valdur til varaborgarstjóra.

**At enda**

Bygdaráðið, sum valt varð fyri fýra árum síðani, hevur havt sín síðsta fund. Herálvur Jacobsen, Erik Davidsen og Nancy Magnusdóttir verða ikki við komandi fýra árini. Eg skal nýta høvi at takka øllum teimum, sum hava verið við síðstu fýra árini fyri fyrimyndarliga gott samstarv, og eg vóni, at tær avgerðir, vit hava tikið og sett í verk, verða til gleði og gagns fyri tey, sum búgva her í okkara kommunu.

Í hesum kunningarskrivinum havi eg roynt at tikið aftur í aftur nakað av tí, ið framt er í hesum valskeiðinum. Vit koma ongantíð á mál, tá tað snýr seg um politikk, og mín vón er, at komandi bygdaráð fer at hava hepna hond at loysa tey mál, ið eru fyri framman.

At enda fari eg bygdaráðsins vegna at ynskja øllum eitt gott nýggjár.

Sørvágur, 14. desember 2012

Vinaliga

Sørvágs kommuna

Sune Jacobsen

**Sørvágs Kommuna**
FO-380 Sørvágur • Tlf. +298 363200 • Fax +298 363201
E-mail: sorvag@sorvag.fo

# Sørvágs kommuna

# Yvirlit yvir fíggjarætlanina fyri 2013

## Høvuðsyvirlit

| Túsund kr. | Rakstrarætlan Útreiðslur | Inntøkur | Løguætlan |
|---|---|---|---|
| **§1. Kommunal fyristiting** | **3.113** | - | **100** |
| 11. Felagsútreiðslur | 3.113 | - | 100 |
| **§2. Almanna- og heilsumál** | **2.616** | - | **-** |
| 20. Heilsumál | 1.084 | - | - |
| 21. Almannamál | 1.532 | - | - |
| **§3. Børn og ung** | **6.721** | - | **100** |
| 26. Barnaansing | 6.721 | - | 100 |
| **§4. Undirvísing** | **3.665** | - | **10.900** |
| 23. Útbúgving og gransking | 3.665 | - | 10.900 |
| **§5. Mentan og frítíð** | **2.380** | - | **700** |
| 23. Útbúgving og gransking | 399 | - | - |
| 24. Mentan | 1.981 | | 700 |
| **§6. Teknisk mál** | **4.594** | | **2.705** |
| 11. Felagsútreiðslur | 1.182 | - | 664 |
| 22. Íbúðarmál | - | | 100 |
| 24. Mentan | 329 | - | - |
| 30. Umhvørvi | 913 | - | 650 |
| 38. Samferðsla og samskiftir | 2.170 | - | 1.291 |
| **§7. Kommunal virki** | **2.972** | - | **325** |
| 30. Umhvørvi | 2.047 | - | - |
| 31. Tilbúgving | 371 | - | - |
| Samferðsla og samskifti | 554 | - | 325 |
| **Tilsamans** | **26.061** | - | **14.830** |
| §20. 22. Íbúðarmál | 900 | - | - |
| §20. 50. Rentur | 1.073 | 101 | - |
| §20. 52. Skattir og avgjøld | - | 33.300 | - |
| Tilsamans | 28.034 | 33.401 | 14.830 |
| Yvirskot | - | 5.367 | - |
| **Rakstrar-, løga- og útlánsætlan RLÙ** | **-** | **-9.463** | **-** |
| §25. 62. Afturgjald av skuld | 1.037 | - | - |
| **Bruttokassaúrslit** | **1.037** | **-9.463** | **-10.500** |
| Fígging | | | |
| §25. 64. Útvegan av gjaldføri | 0 | 10.500 | - |
| Fígging íalt: | 0 | 10.500 | 10.500 |
| **Samanlagt** | **1.037** | **1.037** | |

# Høvuðsyvirlit yvir játtanarroknskapin fyri 2011

| | | Játtan | | | Roknskapur | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | Rakstur og útlán | | | Rakstur og útlán | | |
| | Túsund kr. | **Útreiðslur** | **Inntøkur** | **Løgur** | **Útreiðslur** | **Inntøkur** | **Løgur** |
| § 1. | **Kommunal fyrisiting** | **2.949** | **-** | **102** | **3.216** | **168** | **115** |
| | 11. Felagsútreiðslur | 2.949 | - | 102 | 3.216 | 168 | 115 |
| § 2. | **Almanna- og heilsumál** | **2.804** | **-** | **-** | **2.780** | **-** | **-** |
| | 20. Heilsumál | 1.182 | - | - | 1.298 | - | - |
| | 21. Almannamál | 1.622 | - | - | 1.482 | - | - |
| § 3. | **Børn og ung** | **6.343** | **-** | **81** | **6.125** | **-** | **81** |
| | 26. Barnaansing | 6.343 | - | 81 | 6.125 | - | 81 |
| § 4. | **Undirvísing** | **3.554** | **-** | **6.204** | **3.504** | **-** | **6.193** |
| | 23. Útbúgving og gransking | 3.554 | - | 6.204 | 3.504 | - | 6.193 |
| §. 5. | **Mentan og frítíð** | **1.736** | **-** | **100** | **1.832** | **-** | **-** |
| | 23. Útbúgving og gransking | 385 | - | - | 483 | - | - |
| | 24. Mentan | 1.351 | - | 100 | 1.349 | - | - |
| § 6. | **Teknisk mál** | **3.757** | **-** | **3.103** | **3.343** | **-** | **3.838** |
| | 11. Felagsútreiðslur | 725 | - | 1.519 | 563 | - | 1.819 |
| | 22. Íbúðarmál | - | - | 1.134 | - | - | 983 |
| | 24. Mentan | 99 | - | - | 118 | - | - |
| | 30. Umhvørvi | 730 | - | 300 | 595 | - | 347 |
| | 37. Handil og vinna annars | - | - | -600 | - | - | 33 |
| | 38. Samferðsla og samskifti | 2.203 | - | 750 | 2.067 | - | 656 |
| § 7. | **Kommunal virki** | **2.552** | **-** | **200** | **2.566** | **-** | **506** |
| | 30. Umhvørvi | 1.986 | - | - | 2.030 | - | - |
| | 31. Tilbúgving | 371 | - | - | 576 | - | - |
| | 38. Samferðsla og samskifti | 195 | - | 200 | -41 | - | 506 |
| | **Tilsamans** | **23.695** | **-** | **9.790** | **23.366** | **168** | **10.732** |
| § 20. | 22. Íbúðarmál | 1.000 | - | - | 937 | - | - |
| | 35. Sjóvinna | - | - | - | - | - | - |
| | 50. Rentur | 900 | 280 | | 843 | 126 | |
| | 52. Skattir og avgjøld | - | 29.420 | - | - | 34.736 | - |
| | Tilsamans | 25.595 | 29.700 | 9.790 | 25.146 | 35.030 | 10.732 |
| | Yvirskot | - | 4.105 | - | - | 9.884 | - |
| | | **Útreiðslur** | **Inntøkur** | **Yvirskot** | **Útreiðslur** | **Inntøkur** | **Yvirskot** |
| | **Rakstrar-, løgu- og útlánsætlan RLÙ** | **-** | **-5.685** | **-** | **-** | **-849** | **-** |
| § 25. | 60. Broytingar í "virði" og "skuld v.m." | - | 2 | - | - | -4.494 | - |
| | **Nettokassaúrslit** | **-** | **-5.683** | **-5.683** | **-** | **-** | **-5.342** |
| § 25. | 62. Afturgjald av skuld | 617 | - | - | 983 | - | - |
| | **Bruttokassaúrslit** | **617** | **-5.683** | **-6.300** | **983** | **-5.342** | **-6.325** |
| | Fígging: | | | | | | |
| § 25. | 64. Útvegan av gjaldføri | - | 6.300 | - | - | 6.325 | - |
| | Fíggjan í alt: | - | 6.300 | 6.300 | - | 6.325 | 6.325 |
| | **Samanlagt** | **617** | **617** | **-** | **983** | **983** | **-** |